Ótrúligur HB-sigur í Runavík



HB-unglingarnir avmyndaðir aftaná dystin mikukvøldið, tá HB vann 2-1 á NSÍ. Hetta vóru fyrstu stigini, meistararnir úr Runavík hava sett til í ár. Hinvegin liggur HB nú í kapping við Vágaliðið, KÍa og GÍ um silvur og bronsu.

Mynd: Hilmar Jan

Mikukvøldið vórðu fleiri dystir í unglingadeildini spældir.

Hóast meistaraliðið varð funnið longu í síðstu viku, er kappingin hørð um silvurið og bronsuna.

Ikki færri enn fýra lið eru væl fyri á øðrum til fjórða plássi. Vágaliðið, KÍa og GÍ hava øll 16 stig fyri 13 dystir, meðan HB hevur 14 stig fyri 12 dystir.

HB vann á NSÍ

Størsta sensasiónin hesaferð var sigurin hjá HB móti NSÍ – í Runavík!

Hetta er fyrsti ósigurin, runavíkingum hevur verið fyri í ár, men ikki var hann minni uppiborin fyri tað.

Heimaliðið kom á odda, longu tá bert fáir minuttir vóru spældir. Ólavur Jacobsen fór einsamallur ígjøgnum eina miseydnaða rangstøðufellu.

Hóast nógv vælspæld álop á HB-málið, komu ikki fleiri mál burturúr hjá NSÍ. Leikarar sum Jan Jørgensen og Súni Fríði Johannesen vantaðu tað avgerandi hepni, tá ástóð.

HB vísti lítið í fyrra hálvleiki, og einki var at siga til, at NSÍ var á odda.

So kom vend í

Í seinna hálvleiki kom vend í hjá havnarmonnum, sum nú í longum løtum fingu spælið at ganga rættiliga væl.

Og fyri stríð og slit fingu teir so endiliga eitt mál burturúr í 24. minutti. Svend Poulsen plantaði bóltin uppi í handara trýkanti, tá hann gjørdist púra leysur fyri málinum.

Eftir hetta royndi NSÍ at menna seg aftur, og komu eisini fleiri álop burturúr. Teirra millum eitt, sum setti HB-málverjan Bárð Johannesen út av spælinum, so ein av útileikarunum mátti fara í handskarnar í hansara stað.

Saksasparkað mál

Kortini bar ikki til hjá NSÍ. Spælið hjá teimum bara versnaði í hvørjum, og so hvørt byrjaði eisini at vísa seg, at sigurin lættliga kundi enda aðrastaðni.

Peter Slyne, sum í fyra hálvleiki fekk sera lítið burtuúr, vaknaði rættiliga úr dvala, og eydnaðist honum móti endanum at saksasparka bóltin afturum seg millum 5-meturin og brotssparksblettin til endaliga úrslitið 2-1.

hj.

Unglingar – støðan:

NSÍ	13	59- 4	24
Vágaliðið	12	49-15	16
KÍa	13	42-24	16
GÍ	13	25-21	16
HB	12	34-28	14
B68	12	20-25	9
B36	12	30-36	9
ÍF	12	16-53	8
KÍb	11	6-62	0

Onnur úrslit:

Vágaliðið-B36	6-1
ÍF-KÍa	2-11
GÍ-B68	1-4

Svøríki-Danmark 0-1 (0-0):

Bent gjørdi munin

Mikukvøldið spældi sviar og danir fótbóltsvinardyst á Arosvallen í svenska býnum Västerås.


Ikki varð roknað við nøkrum stórvegis frá danskari síðu, nú liðið var meiri at kalla hálvmannað til dystin handan sundið. Venjarin hevði nevniliga valt heldur at satsa stórt í dystin týskvøldið, sum verður móti Wales.

Stórleikarar sum Flemming Povlsen, Michael og Brian Laudrup og einstakir aðrir vóru ikki við, so sluppu danir við javnleiki, skuldu teir ikki klaga.

Men tá teir 90 minuttirnir vóru av, máttu fyrst og fremst sviar staðfesta, at HM-boomurin ikki er vendur til tað betra enn, hóast sviar serliga í fyrra hálvleiki sýndu stak gott spæl.

Danir vunnu nevniliga dystin 1-0. Í 84. minutti eydnaðist Kim Vilfort at spæla Bent Christensen frían, so hann kundi seta fótin á bóltin í netið.

hj.



Danski landsliðsvenjarin Richard Møller Nielsen var í góðum hýri eftir 1-0 sigurin á svium.

Mynd: Claus Bonnerup

Landsliðið avstað í dag

At eysturríkarar fingu so vánaligt úrslit móti Sveits herfyri, er vónandi bert til fyrimuns fyri føroyska landsliðið, sum í dag fer úr Føroyum til Landskrona í Svøríki.

Mikukvøldið skal landsliðið spæla sín fyrsta EM-dyst móti Eysturríki. Hesin dystur verður at síggja beinleiðis í føroyska sjónvarpinum.

Broytingar gjørdar

Nakrar broytingar eru hendar, nú landsliðið fer avstað. Millum annað hava tveir av leikarunum givið avboð. Teir eru Ib Mohr Olsen, B71 og Øssur Hansen, B68.

Tvinnir venjarar

Ein onnur broyting er tann, at venjarin hjá GÍ, Johan Nielsen, verður við á ferðini sum eitt slag av hjálparvenjara.

Hann er uttan iva eitt gott kort at hava á hondini, tí hann hevur sera nógva royndir innan føroyskan fótbólt.

hj.

Frítíðarhúsið í Lopra

Opið alt árið!

Tlf. 73910 - 73911.



umbro umbro umbro

Sparta-Sport
FR-510 GØTU
FØROYAR (FAROE ISLANDS)
Phone int. +298 41867
Fax int. +298 41938

Tlf. 12546 TÓRS CAFÉ Tlf. 12546
Hósdag — friggjadag — leygardag
3 sløg av kjøtverðum — bakað epli og sós — stórt salatborð.
Et so nógv tú orkar fyri 98,-